# Soleiðis brúkar tú Samleikan geyman á Mac teldu

Áðrenn tú kanst brúka Samleikan á geyma, mást tú seta telduna upp til at brúka geyman. Hendan vegleiðingin er ætlað brúkarum, ið hava Mac teldu.

Byrja við at leggja forritið, sum eitur 'Personal Desktop App' á telduna'. Tú finnur forritið á leinkinum niðanfyri: https://repository.samleiki.fo/download.html

Vel Personal Desktop App til Mac teldur. Tá ið forritið er tikið niðu á telduna, og tú hevur flutt tað í Application, er klárt at brúka Samleikan á telduni.







Far til heimasíðu, ið tú vilt rita inn á, t.d. www.vangin.fo. Vel rita inn. Tá ið tú hevur skrivað títt P-tal skalt tú velja "Rita inn við geyma". Ein mynd kemur fram á skerminum.

Trýst á "Lat upp skriviborðsapp".

Hetta búmerkið kemur nú fram á niðasta bredda. Trýst á tað, um forritið ikki letur upp av sær sjálvum. Skriva títt loynital og trýst á Authenicate, fyri at vátta at myndirnar eru eins.






Um tú fært feilboð, um at Personal Desktop App ikki kann lata upp, skalt tú fara til Stillingar á telduni og velja  'Security and privacy'.

Í rútinum um loyvdar appir standa eini boð um, at hetta er ein ókend app, og tú mást tískil geva loyvi til at teldan brúkar appina.

Tað gert tú við at trýsta á lásið niðast í vinstra horni, síðan skrivar tú títt Apple loynital.
Trýst á 'Open anyway'. Boðini koma nú fram aftur, og tú skalt trýsta á 'Open'.







Far aftur til innritanina og royn aftur.

Gev gætur, tú skalt hava geyman hjá tær, hvørja ferð tú ritar inn við Samleikanum.